# Ognarskattur er ein av møguleikunum



*Thomas Dam, búskaparfrøðingur, og formaður í Búskaparráðnum*

**– Ognarskattur er eitt tabu-evni í Føroyum, og tað er spell, tí tað ber til við ognarskatti alla aðra staðni. Hinvegin skulu nakrar fyritreytir uppfyllast, áðrenn ein møguligur ognarskattur kann setast í verk í Føroyum, sigur Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum**

OGNARSKATTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Orðið ognarskattur fær flestu føroyigar at loypa upp úr stólinum. Kortini er júst hesin skattur eitt av tilmælunum, sum Búskaparráðið kemur við í sínari hálvárligi frágreiðing.

– Nú skulu vit minnast til, at ognarskattur bert er eitt av mongum tilmælum. Hinvegin er ognarskattur ein ógvuliga støðug inntøka í mun til annan skatt og avgjøld, ið eru sera nógv tengd at sveiggjunum í búskapinum, sum eru serliga nógv í Føroyum, sigur Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum.

Formaðurin sigur, at teir í Búskaparráðnum hava ikki læst seg fastar í nakrar smálutir, tí tá gera teir seg inn á politisku skipanina.

– Vit kunnu vís á nakrar møguleikar, og um og hvussu politiska skipanin síðani førir teir út í veruleikan er upp til teir, sigur Thomas Dam.

Tað finnast fleri ymiskir mátar at taka inn ognarskatt. Og har er neyðugt at definera, hvat ein ogn er, og hvørjar ognir í fall skulu skattast.

– Okkara tilmæli og okkara útrokningar halla greitt til bert at skatta sethúsaognir. Og har vísa okkara útrokningar, at samlaði sethúsamarknaðurin í Føroyum hevur eitt virði á 22 milliardir krónur. Verður ognarskatturin ásettur til 0,25%, fara eini hús við virði á 1,5 milliónir krónur at skula gjalda 300 krónur um mánaðin í ognarskatti. Hetta fer so at geva landskassanum eina intøkiu á millum 50 og 55 milliónir krónur um árið, sigur Thomas Dam.

## Sethús

Men fyri at ognarskattur kann innførast er fyrst neyðugt, at øll sethús verða virðismett.

– Talan má tí gerast um eina almenna virðismeting av øllum sethúsum í landinum, so finnast kann fram til ein rættvísan ognarskatt. Tískil skulu nakrar fyritreytir uppfyllast, áðrenn ein møguligur ognarskattur av sethúsum kan setast í gildi, sigur Thomas Dam.

Formaðurin í Búskaparráðnum leggur dent á, at teir í fyrstu syftu bert hava hugsað um sethús, og at aðrir bygningar og aðrar ognir ikki eru inni í myndini hjá ráðnum.

– Tað hevði verið at gingið politisku skipanini ov nær. Ognarskattur hevur altíð verið eitt tabu-evni í Føroyum, og tað er spell, tí hesin skattur virkar fínt í øllum londum uttan um okkum, og tí eigur hann eisini at virka her heima hjá okkum, sigur Thomas Dam.

Men eitt er, at vanligi føroyingurin loypir upp við báðum beinum tá orðið ognarskattur verður nevnt.

– Eisini í miðlunum verður fokuserað ógvuliga nógv á ognarskatt, tá hesin møguleikin verður nevndur, og tað er líka stórt spell, heldur Thomas Dam.

Sum nevnt leggur Búskaparráðið í fyrsta umfari bert upp til, at sethús verða skatta sum ogn, men hvørja móttøku hetta uppskotið so fær í politisku flokkunum er ein onnur søga.

Hinvegin er ognarskattur bert ein av mongum møguleikum, sum Búskaparráðið nevnir, og vit fara seinni í vikuni at viðgera frágreiðingina frá ráðnum í síni heild gjøllari.

# VIÐMERKINGAR

## Minimal veitingar hugsanin má burtur

JÓGVAN PHILBROW
Nevndarlimur, Føroya Pedagogfelag



Alt ov ofta vera tænastur til okkara medmenniskju uppgjørd í krónum og oyrum, ein óhugnalig máti at roknað menniskja virði.

Hendan gongdin má steðgast, um vit skulu hava eitt virðiligt samfelag fyri øll! Eisini næstan og ikki bara næstan.

Vit eiga, í dagsins Føroyum, fleiri menniskju, í dagliga fáa veitt eina "tænastu", ið verður væl og virðiliga rokna út í krónum og oyrum, og síðani verður spart – tí tey eru ov dýr.

Í fjør góðkendi løgtingið ST-sáttmálin um rættindi teirra ið bera brek, síðani er bara spart og framvegis ljóðar kjakið um hvørjar "tænastur" samfelagið eigur at veita. Nær fara vit at fáa eyguni upp fyri veruleikanum, at hesi menniskju ikki bara eiga at fáa eina "tænastu", men hava RÆTTIN til eina virðiliga tilveru, ið samfelagið hevur bundið seg at virða teirra rættindi?

Flest, ið tørva serliga hjálp/stuðul, eru helst komin á onkran stovn, men flestu stovnar eru riknir undir somikið vánaligum fíggjarligum treytum at starvsfólk kenna seg bert før fyri at veita nakrar grundleggjandi uppgávur, reinføri, mat og svøvn. Stovnurin gerst meira og meira ein mekanisk tilvera hjá teimum búfólkunum, tí tíðin hjá starvsfólkunum strekkir ikki til – minstamark játtanir og sparingar í starvsfólkatímum ger at tað er nærum ógjørligt at røkja menniskja í menniskjanum. Tíð eigur eisini at vera til, at síggja og hoyra tey menniskju, ið búgva á stovnunum. Hesi menniskju hava eisini tørv á menniskjaligari samveru – tørv á at hava eitt lív har ið onnur viðurskifti enn bert tey "bráðneyðugu" vera tilgóðarsæð.

At síggja og hoyra eitt menniskja, merkir eisini at tú skalt, sum starvsfólk, kunna hava stundir at "reagera" uppá tað tú sært og hoyrir – og oftani krevst bert ein lítil viðurkenning av menniskjanum fyri at "bjarga" degnum og gera stóran mun í vanliga gerandisdagin.

Vit mugu nú burtur frá hesum "tænastu" hugsanina og fara at hugsað og veita menniskjanum í samfelagnum tey rættindi tey eiga – í kraft av at vera menniskju. Einki minni kann ein vænta av einum nútíðarsamfelagið.

Vit mugu nú staðfesta hvørji rættindi vit ætlað okkum at virða og fáa tey staðfest í einari nútímans løggávu. Samstundis mugu stovnar fáa neyðugu fíggingina fyri at kunna halda ST-sáttmálan. Ella eru vit noydd allan vegin til mannarættindadómstólin í Haag áðrenn tey sum ráða gera nakað?

## Við síðu(r)nar av!? Meina tú tað?

EYÐUN Á BORG



VIÐ SÍÐU(R)NAR AV: Í Útvarpinum var málfrøðingur ikki so neiligur viðvíkjandi at siga »við síðu(r)nar av«. Lurtarin, ið spurdi, mundi halda orðingina vera skeiva.

R: Málfrøðingurin vísti á, at eitt err (r) viðhvørt snikir seg inn í orð, sjálvt um errið ikki er heilt rætt eftir málløruni.

Hann nevndi m. a. dømið, høsnarungi, sum ikki skuldi havt r eftir bendingarlæruni, men sum vit kortini siga, og sum eisini verður góðtikið í orðabókini.

Tað vil siga, at eitt r kemur inn millum sjálvljóðini, a og u, í orðinum, høsnarungi. Tað sama er galdandi í orðinum, páskaregg (r millum a og e).

Errið fer eisini inn millum eitt sjálvljóð og eitt hjáljóð (a og h) í t.d. høsnarhús og Høvdarhagi.

Hetta errið kemur sostatt inn í samansett navnorð. "Við síðuna av" er jú ikki samansett navnorð. Kundi málfrøðingurin kanska sagt okkum onnur dømi, har r fer inn í støk orð?

Annars haldi eg »við síðu(r)nar av« (2 r?) ljóða margháttligt.

R HVØRVUR: Onkuntíð hendir tað øvuta, t.v.s. errið verður ikki úttalað.

Dømi: Meinar tú tað? Har siga vit ikki errið. Heldur ikki í navnorðinum, bátarnir. Kortini mugu vit skriva errið.

Á Borg á Argjum altjóða kvinnadag 2010

*Við málkvøðu*